Teir kunnu leiga fart

Tað er alt ov nógv at krevja, at Teistin skal koma úr Suðuroynni 2. jóladag við nøkrum fáum monnum, sum skulu burtur við skipi

Í Sosialinum í gjár gramdi ein suðuroyingur seg um, at ferðasambandið um Suðuroyarfjørð er ov vánaligt, tá menn, sum skulu mynstra í Danmark 2. jóladag, noyðast heimanifrá jólaaftan.

Ein sjómaður norðanfjarðs heldur, at hesir suðuroyingarnir eru ov krevjandi, um teir vilja hava Teistan at sigla um morgunin 2. jóladag, bara tí teir skulu burtur.

- Tað eru neyvan fleiri enn tveir tríggir mans, og teir kunnu ikki vænta, at Teistin skal sigla bara fyri teirra skyld, sigur hesin sjómaðurin, sum sjálvur hevur roynt at skula burtur beint upp undir jól og helt ikki tað vera nakað at tosa um.

- Aftat tí kemur, at menn, sum sigla við donskum skipum, gjalda ikki ferðina sjálvir. Teir kundu leigað sær fart norður um fjørðin, tí reiðaríið hevði rindað fyri flutingin, sigur hesin sjómaðurin. Hann heldur, at vit nú noyðast at finna okkum í, at landið er fátækt, og at vit tí ikki kunnu loyva okkum at koma við órímiligum krøvum.

randi

Broytingarnar á skúlaøkinum í Suðuroynni:

Færri fara í skúla

Leiðslan á Miðnámsdeplinum í Suðuroynni stúrir fyri avleiðingunum, um bæði HF, handilsskúlin og fiskivinnuskúlin verða niðurløgd

Skúlafólkini í Suðuroynni skilja einki av nøkrum, hví landsstýrið ætlar at avtaka HF-skeiðið, handilsskúlan og fiskivinnuskúlan í Suðuroynni.


Tað kann ikki hava nakað við pengar at gera, tí játtanin til skúlan í Suðuroynni er bara skerd eitt sindur.

Nú skal bara vera studentaskúli í Suðuroynni, ætlar landsstýrið.

- Vit eru sjálvandi fegin um at fáa studentaskúla, men tað er ikki nóg mikið heldur Ole Laursen, leiðari á Miðnámsdeplinum í Suðuroynni.

Eingin hevur tosað við leiðsluna á miðnámsdeplinum um ætlaðu broytingarnar, og hvør tað enn er, sum stendur aftanfyri ætlanina, hava hesi neyvan gjørt sær far um, hvørjar avleiðingarnar í grundini kunnu blíva, halda Ole Laursen og John Mortensen, fyrrverandi leiðari á HF-skeiðnum í Suðuroy.

Teir eftirlýsa eisini grundgevingum fyri ætlanini.



John Mortensen: Suðuroyggin hevur ikki mest brúk fyri studentaskúla. Verður tað, sum landsstýrið ætlar, er vandi fyri, at nógv antin ikki fáa sær útbúgving, ella tey bara fara av landinum

Altíð okkurt

- Fólk her fata hesa ætlanina sum bara eitt av einari langari røð av álopum á suðuroyingar. So er tað suðuroyarsiglingin, so er tað sjúkrahúsið, og nú skúlin, sigur John Mortensen.

Hann er álvarsliga bangin fyri, hvat fer at henda, um tað verður, sum landsstýrið ætlar.

Í Klaksvík hava meira tilkomin fólk alla tíina eisini gingið á HF. Soleiðis hevur ongantíð verið á Suðuroyar HF-skeiði. Har hava alla tíðina bara verið heilt ungir næmingar. Skúlafólk norðanfjarðs halda, at tá so er, kann Suðuroyggin tað sama hava studentaskúla sum HF-skeið, ið upprunaliga varð ætlað fólki, sum av eini ella aðrari orsøk seint komu í gongd við at útbúgva seg.

Soleiðis er skeivt at grundgeva, heldur John Mortensen.

Studentaskúli ikki best í Suðuroynni

- Vit mugu minnast til, at tey fægstu foreldrini hjá okkara næmingum hava bókliga útbúgving. Her er ikki sum í Havn. Summi her halda tað kanska vera fínt at taka studentsprógv, men nógv vilja heldur hava HF og eina praktiska útbúgving sum handilsskúlaútbúgving ella fiskivinnuútbúgving, ið tey kenna seg tryggari við, sigur John Mortensen.

Hann heldur tað eisini vera órímiligt at heingja seg í, at talið av næmingum á fiskivinnuskúlanum ikki hevur verið so stórt. Um roknað verður eftir, kostar hvør næmingur í miðnámsútbúgving í Suðuroynni ikki meira enn miðnámsskúlanæmingar norðanfjarðs.

Samlestur

Og tað hevur aftur sína serligu søgu. Har suðuri hava tey samskipað allar útbúgvingar, soleiðis at tey hava fleiri felags tímar og spara á tann hátt lærarar. Tað hevur riggað væl, og tí hevur tað lítið at siga, um næmingatalið í hvørjari útbúgving ikki er so stórt. Slíkt var eisini neyðugt hjá teimum at gera, tí næmingagrundarlagið er ikki so stórt.

Samlaða talið av næmingum liggur um 100.

Fjarstýring

Tað, sum hevur riggað minni væl, er ábyrgdin. Tríggir skúlastjórar norðanfjarðs, stjórin á handilsskúlan, stjórin í Hoydølum og stjórin á fiskivinnuskúlanum í Vestmanna hava í felag havt ábyrgdina av miðnámsdeplinum í Suðuroy, og tað er heilt burturvið, heldur Ole Laursen. Teir tríggir, sum eru so langt burtur frá skúlanum, hava ongan møguleika at fylgja við. Ábyrgdina eigur leiðslan á Miðnámsdeplinum í Suðuroynni sjálv at hava, sigur hann.

John Mortensen heldur, at suðuroyingar verða illa fyri, um har bara skal vera studentarskúli. Tilgongdin av næmingum verður minni, og tað verður uppaftur torførari enn nú at fáa lærarar.

Øll rýma

- Eg beri ótta fyri, at verður her bara studentaskúli, fara fleiri næmingar heldur til Danmarkar ella til Havnar at útbúgva seg. Tað ber jú ikki til at búgva í Suðuroynni og ganga í skúla í Havn ella í Klaksvík. Fleiri teirra, sum vilja hava útbúgving, fara tá at siga sum so, at tey tað sama kunnu fara til Danmarkar beinanvegin.

Onnur fara at uppgeva at fáa sær nakra útbúgving og verða bara gangandi m.a. í Vági í øllum arbeiðsloysinum, sigur John Mortensen.

Hava mótmælt

Lærararnir á Miðnámsdeplinum hava ikki uppgivið vónina um at sleppa at varðveita tær tríggjar útbúgvingarnar. Teir hava sent løgtingslimunum í Suðuroynni brøv og greitt frá sínum sjónarmiðum. Løgtingslimirnir duga vónandi at síggja, at ungdómurin má hava nøkur útbúgvingartilboð, tí annars rýma tey øll, sigur John Mortensen.

randi

Tórunn Patursson, Sjúkrasystrafelagið

Stjórin vanvirðir okkum

Í oddagreinini í nýggjastu "Vøkuni", blaðnum hjá Sjúkrasystrafelag Føroya, leggur Tórunn Patursson, formaður felagsins, hart út eftir sjúkrahússtjóranum.

Hon skrivar, at sjúkrahússtjórin hevur skýrt sjálvstøðuga sjúkrarøkt sum eitt tómt hugtak, sjúkrasystrar sjálvar skulu hava funnið uppá.

- Makan til vanvirðing av einum yrkisbólki er ringt at fáa eyga á, skrivar Tórunn Patursson.

Hon heldur minsta kravið vera, at sjúkrahússtjórin kennir útbúgvingarnar hjá teimum, sum starvast í sjúkrahúsverkinum.

Tórunn Patursson nevnir ósemjuna á eini deild viðvíkjandi tulking av eini reglugerð. Stjórin tulkaði hesa reglugerð øðrvísi enn vanligt hevur veri, og slíkt elvir ikki til betri samstarv millum starvsbólkarnar.

Tórunn Patursson vil hava sjúkrahússtjóran og læknastjóran til at hava størri virðing fyri sjúkrasystraútbúgvingini.

Sjúkrasystirin er serkøn í heilsu- og sjúkrarøkt, og tí er neyðugt at hava ein sjúkrasystrastjóra í Sjúkrahúsverki Føroya, og hesin eigur at arbeiða á jøvnum føti við lækna- og sjúkrahússtjóran, skrivar Tórunn Patursson.

randi

TVANGSAUKTION

På Dommerkontoret, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, afholdes

torsdag den 12. januar 1995, kl. 11.20

tvangsauktion, (AS 238/94) over matr. nr. 355, Klaksvík, beliggende Klaksvík.

Auktionen er begæret af advokat Jógvan Ellefsen, Bryggjubakki 22, Tórshavn, tlf. 1.1260 (j. nr. 38996) på vegne en pant og udlægshaver.

Ejendommen er et beboelseshus på en 358 kvm. stor grund. Det bebyggede areal udgør 59,5 kvm. i 3 etager.

Ejendommen kan beses efter aftale med ovennævnte advokat.

Auktionsdokumenterne ligger til gennemsyn på dommerkontoret.

Færøernes fogedret,
den 16.12.94
Henrik Engell Rhod
dfm.



at siggjast
rff

haldaragjaldið



Nú ræður um at skunda sær at gjalda